# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya

SSF
1980




Fyri tíðarskeiðið 17. mai 2020 til 27. mars 2021

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hesa tíðina var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Símun Michael Sørensen, næstformaður, Ólavur Hansen, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Eyðun Húsgarð, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, tiltakslimur. Samstarvið hevur riggað væl.

## Undirnevndir

SSF hevur í nøkur ár havt trupulleikar við at fáa mannað sínar undirnevndir, ið eiga at vera í øllum førum ein teknisk svimjinevnd sum tekur sær av reglubundum viðurskiftum ísv heimligar stevnur, umframt ein kappingarnevnd til at taka sær av praktisku fyriskipanini av meistarastevnum okkara.

Tí hevur starvsnevnd SSF røkt eisini hesar uppgávur, saman við aðalskrivaranum og sjálvbodnum úr serliga vertsfeløgunum hjá viðkomandi meistarastevnum, sum í hesum tíðarskeiði vóru HS í sambandi við ABMS 2020 og FM á stuttgeil 2020, og SuSvim í sambandi við FM á langgeil 2020.

Tað hevur fyri so vítt riggað væl; men tók starsnevndin tó á vári 2020 avgerð um at vilja hava serliga teknisku svimjinevndina mannaða aftur - um ikki annað, so við einum umboði úr hvørjum felag, sum tá er fast umboð har millum kalendarafundir.

Hetta eydnaðist tíbetur so mikið væl, at vit hin 6. desember høvdu stovnandi fund fyri nýggju, teknisku svimjinevndina, sum í bókstavarað vóru Jytta Friang úr FS, June Jónsveinsdóttir úr Reysta, Eliesar Lydersen úr Ægir, Heri Mortensen úr SuSvim, Bjørg Olsen úr FLOT og Rúna í Skála úr HS.

Hin 3. februar 2021 skipaði nýggja svimjinevndin seg við Hera Mortensen sum formanni, Bjørg Olsen sum næstforkvinnu, Rúnu í Skála sum skrivara og Jyttu Friang sum varaskrivara.

Av øðrum møguligum nevndum kunnu nevnast landsliðsnevnd og mastersnevnd, ið heldur ikki hava verið virknar nú í fleiri ár, og har tilhoyrandi virksemi tí hevur verið kanska í so lítið. Vónandi kann okkurt gerast við hetta, nú í 2021 ella 2022.

## Dómsnevnd

Í dómsnevndini eru Anni á Hædd, forkvinna, og nevndarlimir Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen. Hesa tíðina var eitt mál sent teimum at viðgera, í sambandi við ov seina tilmelding til FM á langgeil.

## Dómarar

Hesi seinastu árini hava útbúnu yvirdómarar okkara verið Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Rúni Gaardbo, harav Dann Hjelm hevur verið á FINA lista sum altjóða dómari síðani 2010, og Katja Lervig og Rúni Gaardbo síðani 2019, umframt at Erling Eidesgaard og Eyðun Húsgarð í 2019 komu á FINA lista sum altjóða startarar.

Hesir útbúnu yvirdómarar og startarar eru alneyðugir fyri okkum, til at tryggja at okkara stevnur eru í samsvar við galdandi FINA reglur; umframt okkara altjóða dómarar og startarar til at vit kunnu skipa fyri FINA-góðkendum úttøkustevnum til HM og OL. Trýstið er ríkiliga høgt á hesi fáu, og arbeiða vit tí við at fyriskipa eitt nýtt útbúgvingarskeið, til at vaksa um hópin.

## Svimjiskúlin

Jórun Eið Johannesen er saman við Pálini Olsen og Rúna Gaardbo oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava Johan Petur Poulsen, Lis Gøthe í Jákupsstovu og Rók í Jákupsstovu eisini útbúgvin til at undirvísa í skipanini. Hesa tíðina hevur sera lítið virksemi verið í svimjiskúlanum, vegna støðuna við korona; men eru ítøkiligar ætlanir longu um fleiri skeið í 2021.

## Lívbjarging

Sørin S. Djurhuus stendur saman við Djóna Dalsgarð á odda fyri lívbjargingarátaki okkara, sum serliga fæst við at útbúgva lívbjargarar til okkum í føroysku svimjingini og hjá stovnum, kommunum, skúlum og øðrum felagsskapum, umframt at eftirkanna tilbúgvingina í føroyskum svimjihallum.

Virksemið er serliga at skipa fyri regluligum lívbjargararoyndum, sum samstundis eru árlig uppfrískan í lívbjarging og í tilbúgvingini á staðnum har lívbjargarin virkar. Av tí at hóparnir eru lítlir sum fara til hvørja av hesum royndum, so hevur hetta virksemið kunna hildið áfram hetta tíðarskeiðið, um enn eitt sindur skert og við steðgum vegna støðuna við korona.

## Skrivstova og roknskapur

Djóni Dalsgarð hevur verið aðalskrivari SSF síðani 2009, afturat í 1992-1996, við ábyrgd fyri dagliga virkseminum á skrivstovuni, umframt at hava nógvar aðrar uppgávur so sum at vera skrivari á starvsnevndarfundum og líknandi, og at luttaka í fyriskipanini av tiltøkum og stevnum SSF.

Í 2019 fráboðaði Djóni at hann ynskti at gevast í hesum starvi, og hevur hansara partur tí so smátt verið minkandi, til at hann nú fyri so vítt 'bara' fæst við at hjálpa Sørini Djurhuus við okkara lívbjargingarátaki, umframt at hjálpa okkum við bankaflytingum og líknandi.

Í hansara stað rekur fyribils undirritaði formaður uppgávuna sum skrivari á starvsnevndarfundum, umframt at gera hetta ymiska gerandisliga, so sum at senda út svimjimerki og svara teldupostum. Vit ætla í næstum at søkja eftir aðalskrivara aftur.

Símun Michael Sørensen hevur síðani 2014 verið bókhaldari og kassameistari hjá SSF, umframt nú síðani 2019 eisini næstformaður SSF. Eg haldi meg kunna siga, at vit við honum og góðari hjálp frá eisini grannskoðara okkara Menta, hava munandi styrkt um okkara bókhald og fíggjarstýring.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, er ein rúgva av góðum kreftum í svimjingini, sum vit hava dúvað uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, sum vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

At nevna eru kalendarafundirnir og svimjiráðstevnurnar, sum hava verið tvær sera góðar keldur til hjálp og konsensus, tá ið tað kemur til at skipa virksemið innan føroyska svimjing, umframt sjálvsagt aðalfundirnir og aðrir fundir við formenn og onnur, til at viðgera tað sum nú einaferð er.

Hetta hevur alt sum heild riggað væl, og vit eru glað fyri, at feløgini eru røsk at melda aftur, eisini tá ið ynskini ganga ímóti okkara egnu ætlanum.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2021 vóru tað 802 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í HS, 106 í FLOT, 143 í Ægir, 100 í SuSvim, 67 í FS og 36 í Reysta.

Í mars 2020 vóru tey 703 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 276 í HS, 115 í FLOT, 114 í Ægir, 92 í SuSvim, 58 í FS og 48 í Reysta.

# Korona

Hin 4. mars 2020 varð fyrsti tilburður staðfestur í Føroyum, av hesi alheims koronafarsótt sum tá spjaddist og enn spjaðist við ferð um heimin. Av tí at hendan støða í stóran mun kom at merkja og skerja okkum øll, so velji eg at byrja við einum samandrátti her, til at kunna fara eitt sindur skjótari um hesa støðu í restini av frágreiðingini.

Nakrar týðandi dagfestingar

- 4. mars 2020 - fyrsti koronatilburður staðfestur í Føroyum
- 6. mars 2020 - landsstýrið fráboðar ítøkilig átøk til at fyribyrja smittu (max 500 saman)
- 11. mars 2020 - HS-stevnan 12. - 13. mars 2020 avlýst vegna korona
- 12. mars 2020 - løgmaður fráboðar at Føroyar fara niður í ferð (max 100 saman)
- 12. mars 2020 - ÍSF mælir til at steðga øllum ítróttarvirksemi í tvær vikur
- 12. mars 2020 - Danish Open 2020 avlýst vegna korona
- 13. mars 2020 - løgmaður fráboðar at flogferðslan verður munandi skerd
- 16. mars 2020 - farsóttanevndin fráboðar herðing av tilmælunum (max 10 saman)
- 17. mars 2020 - SSF skriv til feløgini um støðuna við korona
- 23. mars 2020 - ÍSF tekur undir við at leingja koronatiltøkini, fyribils til og við 13. apríl
- 24. mars 2020 - SSF fráboðar at Atlantic Open 24. - 26 apríl 2020 er avlýst vegna korona
- 24. mars 2020 - IOC fráboðar at OL í Tokyo er útsett frá 2020 til 2021
- 8. apríl 2020 - løgmaður fráboðar at Føroyar fara varisliga upp í ferð (m.a. ítróttur frá 9. mai)
- 8. apríl 2020 - ÍSF tekur undir við at byrja ítróttin aftur í samstarvi við koronaráðgevingina
- 11. apríl 2020 - SSF fráboðar at svimjingin nú so smátt fer í gongd aftur
- 15. apríl 2020 - Aðalfundur SSF útsettur frá 17. apríl til 16. mai 2020 vegna korona
- 17. apríl 2020 - SSF fráboðar fyrstu útgávu av venjingartilmælum ísv korona
- 26. apríl 2020 - ILS fráboðar útseting av aðalfundi og ráðstevnu til 2021, og av HM til 2022
- 30. apríl 2020 - LEN fráboðar at EJM 2020 er avlýst
- 30. apríl 2020 - løgmaður fráboðar at Føroyar fara upp í ferð (max 50 saman)
- 4. mai 2020 - FINA fráboðar at HM 2021 verður útsett til 2022
- 5. mai 2020 - Fyriskipararnir fráboða at NMU 2020 er avlýst
- 5. mai 2020 - LEN fráboðar at EM 2020 er útsett til 2021

- 11. mai 2020 - SSF fráboðar dagførda útgávu av venjingartilmælum ísv korona
- 14. mai 2020 - løgmaður fráboðar at Føroyar fara enn meira upp í ferð (max 100 saman)
- 17. mai 2020 - SSF fráboðar fyrstu útgávu av kappingartilmælum ísv korona
- 17. mai 2020 - SSF fráboðar (aftur) dagførda útgávu av venjingartilmælum ísv korona
- 29. mai 2020 - landsstýrið fráboðar Føroyar lata enn meira upp mótvegis umheiminum
- 16. juni 2020 - SSF fráboðar dagførda útgávu av kappingartilmælum ísv korona
- 27. juni 2020 - Føroyar lata enn meira upp mótvegis útheiminum
- 9. juli 2020 - SSF fráboðar at Nordic Open Masters ikki verður í 2020, tó vónandi í 2021
- 12. juli 2020 - ÍSF fráboðar at ítróttarfeløg kunnu søkja um koronastuðul fyri fyrri árshálvu
- 6. august 2020 - Landslæknin fráboðar at støðan er aftur sera álvarsom, metnógvir tilburðir
- 7. august 2020 - ÍSF heitir aftur á øll ítróttarfólk um at fylgja koronatilmælunum
- 22. august 2020 - SSF fráboðar útseting av HS- og Ægir-stevnum vegna korona
- 6. september 2020 - SSF fráboðar at venjingar- og kappingartilmæli ísv korona nú eru -reglur
- 23. september 2020 - HS fráboðar at stevnan 26. september er útsett vegna korona
- 26. september 2020 - IIGA fráboðar at Oyggjaleikir 2021 eru útsettir til 2022
- 10. oktober 2020 - SuSvim fráboðar at stevnan á Tvøroyri er avlýst vegna korona
- 3. november 2020 - SSF fráboðar FMS og JMS 2020 í skerdari útgávu vegna korona
- 9. november 2020 - Landsstýrið herðir ferðatilmælini (eingin óneyðug ferðing til onnur lond)
- 14. desember 2020 - løgmaður fráboðar herd koronatilmæli ísv jól (m.a. 0 áskoðarar í ítrótti)
- 29. desember 2020 - HMR fráboðar at vaccinan á veg, fyrsti føroyingur koppsettur 30. des
- 6. januar 2021 - fyrsti føroyingur deyður við koronu
- 9. januar 2021 - Danmark herðir ferðatilmælini (allur heimurin nú reyður)
- 5. mars 2021 - galdandi almennu koronatilmæli linkaði til at 200 nú kunnu savnast í senn
- 11. mars 2021 - ÍSF fráboðar umbøn um hjálparpakka til ítróttarfeløg fyri 2. hálvu av 2020

Ein lang elendigheit, har vit í Føroyum enntá kunnu prísa okkum lukkulig, tí at vit eru sloppin so lutfalsliga lætt. Gott nokk hava vit ikki kunnað kappast uttanlanda síðani at koronafarsóttin legðist um alt - men hinvegin hava vit verið lítið rakt sjálvi, tá ið tað kemur til heimliga venjing og kapping.

Starvsnevnd SSF var heilt tíðliga samd um, at vit ynsktu so vítt gjørligt at halda áfram við okkara vanliga virksemi - um neyðugt við kreativum loysnum - men at vit samstundis mettu tað sum alneyðugt at halda seg til almennu tilmælini, og at ikki finna uppá nýtt sum kundi vaksa um vandan.

Tíðin hevur neyðturviliga verið merkt av stórari óvissu, har fólk hava lagt nógv fyri til at fáa eitthvørt at rigga, fyri síðani at verða noydd at avlýsa aftur, sum tá ofta kravdi enn meira arbeiði.

SSF hevur haft tann luksustrupulleika, at ein stórur partur av okkara fígging ikki kundi brúkast til ætlaða virksemi, sum í stóran mun er uttanlanda luttøka á svimjistevnum, venjing og undirvísing við útlendskari serfrøði, umframt virksemi í sambandi við okkara altjóða limaskapir.

Vit fingu heldur ikki bara víðkað okkara heimliga virksemi, nú tað til dømis ikki var ráðiligt at skipa fyri venjingarlegum, ella at gera annað sum kundi økja um okkara virksemi, men sum samstundis kundi økja um smittuvandan.

Og so var tað hin serligi trupulleikin, at vit skuldu halda okkum til hesi í mesta lagi 100 fólkini sum kundu savnast í senn, har ein vanlig svimjistevna ofta hevur 100 so skjótt sum bara svimjarar og dómarar eru møttir. At vit illa kundu hava áskoðarar til staðar, um vit skuldu kunna vera undir 100.

Tann eina stóra íløgan varð tí at keypa eina rættiliga stroymingarloysn, til okkara egnu fólk at kunna reka. Hetta so at áhugaði kundu fylgja við, og so at okkara svimjistevnur vónandi gjørdust betri, í hesum døgum tá ið tað mestsum var hopuleyst at sleppa uttanlands at royna seg.

Hvussu væl tað hevur hepnast, má tíðin vísa. Eingin av okkum hevur valt hesa støðu, og tað er so avgjørt eingin av okkum sum ynskir hana. Vónandi eru vit skjótt komin burturúr hesi ólukku koronafarsótt, so at vit kunnu koma aftur til tað sum vit upprunaliga høvdu ætlað okkum at gera.

Í verandi løtu er mesta lagi 200 fólk sum kunnu savnast í senn, og lættir tað sjálvsagt nógv um. Eitt tungt sum vit tó hava lært av hesi koronafarsótt, er at svimjihallirnar í Føroyum ikki eru so vælegnaðar til at kunna skipa fyri neyðugu frástøðu, einvegis ferðslu og sundurskiljing av hópum; og at vit tí ikki neyðturviliga kunnu hava so nógv inni, fyri tað um tilmælini loyva upp til 100 ella 200.

Hetta síðsta verður mest sannlíkt nógv betri longu í 2023, tá ið langhylurin kemur afturat í Havn.

# Svimjiárið 2019-2020

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta árið fyri tilsamans 9 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 1 meistarastevnu og 1 altjóða meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

Í mars 2020 hendi so tað, at øll svimjing mátti niðurleggjast vegna korona, so at 3 FINA-góðkendar stevnur mátti avlýsast og 2 útsetast, áðrenn vit fingu avgreidd okkara koronaskerdu útgávur av ABMS í mai og síðani FM á langgeil í juli mánaða.

FM á langgeil varð á sumri 2020 góðkend av FINA sum úttøkustevna til OL í Tokyo, nú OL var útsett til í 2020. Hetta vísti seg at verða einasta OL-úttøkustevna í danska ríkisfelagsskapinum í 2020.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 7.-8. sep. 19 | 25m | 36 | 4 | 80 | 0 | 424 | 708 |
| Ægir Open | Klaksvík | 5.-6. okt. 19 | 25m | 37 | 5 | 89 | 36 | 598 | 714 |
| FM á stuttgeil | Tórshavn | 1.-3. nov. 19 | 25m | 69 | 5 | 69 | 54 | 595 | 710 |
| NM/NJM | Tórshavn | 29. nov. - 2. des. 19 | 25m | 69 | 7 | 180 | 32 | 987 | 815 |
| HS Xmas Open | Tórshavn | 21. des. 19 | 25m | 31 | 5 | 80 | 30 | 376 | 658 |
| Ægir Open | Klaksvík | 15.-16. feb. 20 | 25m | 51 | 6 | 94 | 5 | 747 | 734 |
| SuSvim Open | Vágur | 29. feb. - 1. mar. 20 | 50m | 48 | 5 | 95 | 0 | 638 | 718 |
| HS Open - Avlýst | Tórshavn | 14. - 15. apr. 20 | 25m | | | | | | |
| HS B1-4 - Avlýst | Tórshavn | 18. apr. 20 | 25m | | | | | | |
| Atlantic Open - Avlýst | Vágur | 24. - 26. apr. 20 | 50m | | | | | | |
| ABMS - Útsett | Klaksvík | 30. - 31. mai. 20 | 25m | 32 | 6 | 50 | 0 | 311 | 451 |
| FM á langgeil - Útsett | Vágur | 3. - 5. jul. 20 | 50m | 76 | 5 | 63 | 15 | 616 | 717 |

# Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta árið fyri tilsamans 3 svimjistevnum í skúlahyljum styttri enn 25 metrar, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum  hin 28. september 19, Reysta-stevna í Leirvík hin 12. oktober 10 og FLOT-stevna á Toftum hin 1. februar 20. FS noyddist vegna hølistrupulleikar at útseta sína stevnu hin 23. november 19 fyri síðani at avlýsa hana hin 21. mars 20, meðan Reysti vegna korona mátti fyrst útseta og síðani avlýsa sína hin 7. mars 20, og SuSvim somuleiðis sína hin 28. mars 20.

Hetta eru stevnur fyri okkara yngstu aldursbólkar, og var støðan tíverri vegna hesa ólukku koronafarsótt, at okkara allaryngstu svimjarar í bólki 1 og 2 ikki fingu fleiri kappingartilboð til sín bólk í 2020, meðan tey í bólki 3 og 4 fingu ABMS um mánaðarskiftið apríl/mai og síðani einki.

Summi valdu at luttaka saman við teimum eldru svimjarunum á teimum opnu stevnunum, og nøkur vóru so mikið skjót at tey kvalifiseraðu seg til eisini FM á langgeil og stuttgeil. Men, tað er eingin ivi um, at tað vóru serliga hesi yngstu hjá okkum sum føldu sviðan av koronatilmælum og -reglum.

Tað hoyrir við til søguna, at tey sum kundu koma aftur at venja aftaná fyrstu afturlating á vári 2020, vóru avmarkað til tey sum høvdu nakað at venja fram ímóti, tvs. ABMS og/ella FM á langgeil 2020. Restin mátti bíða við svimjing til aftaná summarfrítíðina, ið var neyðugt men tó væl hugsandi óheppið fyri framtíðar kappsvimjing.

Lukkutíð vóru tey heilt nógv sum komu aftur, eisini hóast tilboðini enn eru avmarkaði.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar kappaðust hetta árið tilsamans minst 1000 ferðir sum einstaklingar og 22 ferðir sum lið, á 9 uttanlanda stevnum, harav 2 vóru altjóða meistarastevnur. Á hesum stevnum vunnu okkara svimjarar minst 22 gull, 19 silvur og 17 bronsur.

Serliga nevnivert er, at Signhild Joensen (2000) úr Ægir vann 2 gull og Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS 1 gull og 1 silvur á NM/NJM 2019 í Tórshavn.

Í mars var tað so korona sum setti ein steðgara fyri øllum, serliga tá ið tað kom til uttanlanda luttøku, og varð tað tí so harmiligt at alt varð avlýst ella útsett sum vit ætlaðu okkum til, íroknað Danish Open, EM á langgeil, EJM, NMU og OL 2020.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Poseidon Team Cup | SWE | 6.-8. sep. 19 | 25m | 1 | 0 | 7 | 1 | 1 | 1 | 708 |
| DM-Ø | DEN | 4.-6. okt. 19 | 25m | 1 | 0 | 7 | 2 | 1 | 0 | 761 |
| World Cup Berlin | GER | 11.-13. okt. 19 | 50m | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 | 773 |
| Íslandsmeistaramótið 25 | ISL | 8.-10. nov. 19 | 25m | 9 | 2 | 65 | 6 | 6 | 3 | 746 |
| Køge Open Køge | DEN | 22.-24. nov. 19 | 25m | 50 | 22 | 387 | 0 | 0 | 0 | 440 |
| Køge Open Herfølge | DEN | 23.-24. nov. 19 | 25m | 21 | 1 | 173 | 7 | 6 | 7 | 274 |
| Nordic Champs | FAR | 29. nov - 1. des. 19 | 25m | 15 | 8 | 87 | 3 | 1 | 0 | 779 |
| EM á stuttgeil | GBR | 4.-6. des. 19 | 25m | 3 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 731 |
| DM for hold | DEN | 13.-15. des. 19 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 706 |
| Reykjavík International | ISL | 24.-26. jan. 20 | 50m | 40 | 0 | 278 | 3 | 4 | 6 | 717 |
| Danish Open - Avlýst | DEN | 28. mar - 1. apr. 20 | 50m | | | | | | | |
| EM á langgeil - Útsett | HUN | 11.-16. mai 20 | 50m | | | | | | | |
| EJM - Avlýst | GBR | 1.-5. jul. 20 | 50m | | | | | | | |
| NMU - Avlýst | LTU | 11.-12. jul. 20 | 50m | | | | | | | |
| OL - Útsett | JPN | 24. jul-29. aug. 20 | 50m | | | | | | | |

# Landsliðshópar 2019-2020

## NM/NJM 2019 í Tórshavn

**Svimjarar**:  Alisa Vestergaard (2003) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), , Jonna Joensen (2005), Rebekka Trygvadóttir (2004), Rókur Trygvason (2000) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Nancy N. Dam (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan N. Dam (2002) úr HS. Óli Mortensen (1996, HS) var eisini úttikin, men gav avboð.
**Venjarar**: Balazs Sasvari, Panagiotis Christou og Juan Jaime Arroyo Toledo
**Ferðaleiðarar**: Yvonna og Óli Toftum

## Danish Open 2020 í Taastrup - Avlýst

Fylgjandi svimjarar kláraðu kravtíð, og fylgjandi venjarar og leiðarar tóku av uppgávuni, um enn tað vegna korona ongantíð varð viðkomandi at taka endaliga liðið út.

**Svimjarar**: Bartal Debes (2002) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Signhild Joensen (2000) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan N. Dam (2002) úr HS
**Venjarar**: Venjarar skuldu verða Balazs Sasvari og Panagiotis Christou
**Ferðaleiðari**: June og Trúgvi Jóhanson

## EM 2020 í Budapest - Avlýst

**Svimjarar**: Hesir svimjarar kláraðu kravtíð, um enn tað ongantíð varð viðkomandi at taka endaliga út: Signhild Joensen (2000) úr Ægir og Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS.
**Venjari**: varð ongantíð viðkomandi at áseta
**Ferðaleiðari**: varð ongantíð viðkomandi at áseta

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu tilsamans 5 føroysk met og 4 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2019-2020, tað vil siga frá 1. september 2019 til 31. august 2020.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 25 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2018-2019.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x200 | Frí | 25m | K | 08:26.81 | Vár E. Eidesgaard<br>Signhild Joensen<br>Barbara Debes<br>Alisa Vestergård | 2000 | SSF | NM/NJM 2019 | 2019-11-29 | FAR |
| 400 | Frí | 25m | K | 04:14.59 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2019 | 2019-11-29 | FAR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:28.37 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | NM/NJM 2019 | 2019-11-30 | FAR |
| 800 | Frí | 25m | K | 08:40.78 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2019 | 2019-12-01 | FAR |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.94 | Rókur Trygvason | 2000 | Ægir | Ægir Open | 2020-02-15 | FAR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 50m | K | 04:40.03 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Eyðrið Mortensen<br>Kristina í Skála<br>Ronja Ró í Dímun | 2004 | HS | FML | 2020-07-03 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:20.14 | Bartal E. Eidesgaard<br>Niklas Jógvan Arge<br>Johan N. Dam<br>Johannis Erlendsson | 2002 | HS | FML | 2020-07-03 | FAR |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 08:38.50 | Bartal. E. Eidesgaard<br>Høgni H. Thomassen<br>Johannis Erlendsson<br>Johan N. Dam | 2002 | HS | FML | 2020-07-04 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:48.83 | Johan N. Dam<br>Johannis Erlendsson<br>Niklas Jógvan Arge<br>Bartal E. Eidesgaard | 2002 | HS | FML | 2020-07-05 | FAR |

# Svimjiárið 2020-2021

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú skipað fyri tilsamans 8 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, hetta svimjiárið, harav einari meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 12.-13. sep. 20 | 25m | | | | | | 685 |
| Ægir Open | Klaksvík | 3.-4. okt. 20 | 25m | | | | | | 727 |
| Ægir Open | Klaksvík | 31.okt-1.nov.20 | 25m | | | | | | 747 |
| FM á stuttgeil | Tórshavn | 13.-15. nov. 20 | 25m | | | | | | 759 |
| SuSvim Open - avlýst | Vágur | 12.-13. des. 20 | 50m | | | | | | - |
| Ægir-stevna - avlýst | Klaksvík | 16.-17. jan. 20 | 25m | | | | | | - |
| SuSvim Open | Vágur | 6.-7. feb. 20 | 50m | | | | | | 677 |
| Ægir Open | Klaksvík | 20.-21. feb. 20 | 25m | | | | | | 695 |
| HS Open* | Tórshavn | 12.-13. mar. 20 | 25m | | | | | | |
| Ægir-stevna* | Klaksvík | 20. mar. 20 | 25m | | | | | | |

# Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava til nú ikki skipað fyri eini einastu svimjistevnu í skúlahyljum styttri enn 25 metrar, í hesum svimjiári, og faktiskt síðani at korona kom til landið í mars 2020. Hetta vegna almennu koronatilmæli, sum starvsnevnd SSF valdi at gera til koronareglur. Vit halda stutt sagt ikki, at tað er gjørligt at halda neyðugu frástøðu í hesum hallum, runt hylin og í umklæðingarrúmunum, um ein vanlig svimjistevna verður fyriskipað har.

Í staðin hava feløgini funnið aðrar loysnir; fyrst Ægir við at skipa fyri eini stuttleikastevnu í Klaksvíkar Svimjihøll hin 16. januar 2021, síðani SuSvim við at skipa fyri eini aldursbólkastevnu har tey svumu uppá tvørs av vanligu geilunum í Páls Høll í Vági hin 6. mars, og síðani FLOT, FS og Reysti við at skipa fyri eini felags aldursbólkastevnu í Klaksvíkar Svimjihøll hin 20. mars.

Hetta hava verið avbjóðandi stevnur, tí at finnast skuldi uppá øðrvísi loysnir, samstundis sum at undirtøkan hevur verið avbera góð. Sjálvt stóru hallirnar eru ikki størri enn enn, at tað kann vera trupult at skapa neyðugu frástøðu, og tí mátti t.d. felagsstevnan hin 20. mars umskipast, til at tey svumu í fleiri bólkum enn upprunaliga ætlað, og ikki komu í høllina fyrr enn neyðugt var.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar hava fyri so vítt slettis ikki kappast uttanlanda í hesum svimjiári, út yvir at Signhild Joensen (2000) úr Ægir er flutt til Danmarkar, og tí neyðturviliga luttekur í kappingum har, sum enntá hava verið fáar vegna teirra sera hørðu koronaaavmarkingar.

Tilsamans 14 úrslit bleiv tað til hjá Signhild, harav hon 5 ferðir var plaserað til gull og 2 ferðir til silvur. Mest merkisvert er vælsagtans, at hon hevði so mikið góð úrslit at vísa á, at hon kundi luttaka á OL-úttøkustevnuni í Vejle hin 5. til 7. mars 2021, sum annars hevði ekstremt harðar kravtíðir.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NOM 2020 - avlýst | FAR | 2.-4. okt. 20 | 25m | | | | | | | - |
| NM/NJM 2020 - avlýst | SWE | 4.-6. des. 20 | 25m | | | | | | | - |
| HMS 2020 - avlýst | UAE | 15.-20. des. 20 | 25m | | | | | | | - |
| Dual Meet Allerød | DEN | 19. sep. 20 | 25m | 1 | 0 | 3 | 1 | 1 | 0 | 567 |
| Holdturnering Allerød | DEN | 3. okt. 20 | 25m | 1 | 0 | 2 | 2 | 0 | 0 | 687 |
| Holdturnering Kastrup | DEN | 7. nov. 20 | 25m | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 0 | 695 |
| DM kortbane Helsingør | DEN | 14.-17. nov. 20 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 673 |
| OL kvalifikation Vejle | DEN | 5.-7. mar. 21 | 50m | 1 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 | 754 |

# Landsliðshópar 2020-2021

Eingir landsliðshópar eru enn úttiknir til nakra stevnu í hesum svimjiári - men vit vóna at kunna taka út hópar til fylgjandi stevnur í vár og í summar:

- EM í Budapest hin 17. til 23. mai 2021
- EJM í Rom hin 6. til 11. juli 2021
- NMU í Litava hin 10. til 11. juli 2021

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett éitt føroysk met og einki føroyskt junior, hetta svimjiárið 2020-2021, tað vil siga frá 1. september 2019.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 5 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2019-2020.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | K | 01:59.00 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Eyðrið Mortensen<br>Vár E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun | 2001 | HS | Ægir Open | 2021-11-01 | FAR |

# Annað virksemi 2020-2021

## Altjóða virksemi

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum altjóða pallum, har vit verða væntað at luttaka, so sum í norðurlendska svimjisambandinum NSF, norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, evropeiska svimjisambandinum LEN, altjóða svimjisambandinum FINA, umframt nú eisini evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- 2. - 4. oktober 2019: NSLG ársfundur í Stockholm
- 5. - 10. oktober 2019: WCDP lívbjargingarráðstevna í Durban
- 6. desember 2019: NSF formansfundur í Glasgow
- 30. januar 2020: NSF aðalskrivarafundur í Tallinn
- ~~9. - 10. mai 2020: LEN kongress og NSF aðalfundur í Budapest~~ - útsett
- ~~NEC svimjifrálæruráðstevna~~ - avlýst
- 4. november 2020: NSLG ársfundur - á netinum
- ~~19. september 2020: ILS kongress í Riccione~~ - útsett
- 8. november 2020: LEN kongress - á netinum
- ~~Desember 2020: FINA World Aquatics Convention í Abu Dhabi~~ - útsett
- ~~28. januar 2021: NSF aðalskrivarafundur~~ - avlýst

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum kappingunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- 18. - 22. september 2019: FINA høvuðsvenjaraskeið í Reykjavík
- 26. oktober 2019: WinGrodan-skeið í Tórshavn
- 8. februar 2020: Kalendarafundur í Tórshavn
- 21. - 22. februar 2020: Talentlega í Klaksvík
- ~~7. - 8. mars 2020: Landsliðlega í Vági~~ - avlýst
- ~~Várið 2020: FINA hjálparvenjaraskeið í Tórshavn~~ - avlýst
- ~~27. juni 2020: Svimjifagnaðurin 2020~~ - avlýst
- ~~29. - 30. august 2020. Landsliðslega í Klaksvík~~ - avlýst
- ~~12. - 13. september 2020: Talentlega í Tórshavn~~ - avlýst
- ~~8. - 10. januar 2021: Venjingarlega í Vági~~ - avlýst
- ~~12. - 13. februar 2021: Talentlega í Klaksvík~~ - avlýst
- 27. februar 2021: Kalendarfundur í Saltangará

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har formenn og -kvinnur í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin serliga verið um flyting úr nú niðurtikna ÍSF-húsi, um almenna stuðulin og um møguligan COVID-19 stuðul, umframt um dátuverndarlóg í koming. Hartil fundast vit árliga við fíggjarnevnd ÍSF.

## NSF

Hetta árið hevur verið óvanliga friðarligt í Nordic Swimming Federation, sikkurt tí at hini londini eru so koronaavmarkaði. Ein formansfundur var uppundir LEN-valið í november 2020; men annars hevur tað verið sera kvirt, íroknað at eingin aðalfundur var í 2020, og eiheldur vanligi aðalskrivarafundurin nú í januar. Vegna hetta er enn einki formliga avgjørt um NMU, NOM og NM/NJM 2021.

## LEN

Í LEN hevur eisini verið friðarligt, tá ið fyrst ætlaðu tiltøk vóru avlýst ella útsett. Í prinsippinum var kampval um forsetan og aðrar týðandi postar á tykisliga aðalfundinum í november, ið tá endaði við greiðari undirtøku fyri sitandi stjórn. Undirritaði Rókur í Jákupsstovu heldur áfram í miðlanevnd LEN, hesi næstu fýra árini, meðan Jon Hestoy misti sítt pláss í teknisku nevndini fyri open water svimjing.

## FINA

Í FINA hevur neyðturviliga eisini verið friðarligt, um umsitingin har er rættiliga røsk at halda lív í teimum stuðulsskipanum sum tey skipa fyri, so sum Olympic Aquatics Support Programme, FINA Coaches Certification Programme, FINA Clinics for Swimming Officials og FINA World Aquatics Day. Í mai verður t.d. eitt FINA-dómaraskeið hjá okkum á netinum, eftirsum vit ikki so væl kunnu samlast

## ILS/ILSE

Í altjóða lívbjargingini ber av - tey hava verið røsk at tíðliga útseta alt vegna korona, sum annars var á skránni í 2020. Har skuldi hava verið aðalfundur og ráðstevna  í sambandi við HM í lívbjarging í Italia, men varð alt tað flutt og útsett longu í apríl, so at aðalfundurin og ráðstevna nú verða í Sri Lanka á heysti í 2021 og HM í lívbjarging á heysti í 2022.

# Onnur tiltøk

## Úrval

Úrval játtaði til 2020 oyramerktan stuðul til hesar fýra svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) og Rók Trygvason (2000) úr Ægir, og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag. Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Til 2021 játtaði Úrval so aftur oyramerktan stuðul til hesar fýra svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) úr Ægir, og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag. Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Umsitingarvirksemið ísv Úrval er komið í fasta legu hjá okkum, men var tað trupult hjá okkara at finna loysnir til at kunna brúka sína játtan, so at tað mesta nú má flytast aftur til Úrval.

## Landslið

Okkara landsliðsarbeiði hevur verið sera hart rakt av støðuni við korona, nú einki bar til uttanlanda, og tað vegna tilmælini var trupult at fáa skipað fyri nøkrum í Føroyum heldur. Tað var líka tann fyrsta, væleydnaða talentlegan í februar 2020, og síðani einki uttan ætlanir sum máttu leggjast til viks, til vit nú í 2021 so smátt aftur eru farin undir loysnir til at kunna gera okkurt innan tilmælini.

## FOASP

SSF hevur síðani 2018 gjørt íløgur í testútgerð og annað, sum liður í sokallaðu FOASP verkætlani, har FINA bjóðar fíggjarligan stuðul til menning av sersambondunum. Tíverri vóru okkara fyrstu royndir heldur miseydnaðar, har hátøkniliga Tritonwear-útgerðin vísti seg at vera trupul at innføra í dagliga venjing, og har eisini lítið sást aftur frá teirri á vetri 2018-2019 keyptu VO2Master-útgerð.

Vit hava tí valt at leggja um til útgerð ið vónandi er lættari at innføra, og at geva ávísum persónum við føstum tilknýti til SSF uppgávuna at fáa hana út í nýtslu á stevnum, venjingarlegum og kanska dagligari venjing eisini, heldur enn at lata hesa uppgávu yvir til venjarar hjá feløgum sum vit í 'miðfyrisitingini' ikki á sama hátt hava eitt fast tilknýti til.

Um árskiftið 2019-2020 keyptu vit eitt Speed RT Velocity meter frá italsku AP Lab, umframt 100 WinnerCam at lána út beinleiðis til svimjarar og venjarar, við innleiðandi undirvísing. Hartil hava vit

keypt eina sokallaða ATU-X tíðtakingarskipan frá svensku IC Control, til at kunna hava eltíð á stevnum í skúlahyljum, umframt í sambandi við NM/NJM 2019 eina grafikk-loysn eisini.

Tá ið so korona legði tað mesta stilt, og gjørdi tað trupult at bjóða áskoðarum til stevnu, valdi starvsnevnd at fyribils leggja um, til heldur at gera eina størri íløgu í stroymingarloysn frá IC Control, sum síðani hevur verið nýtt á okkara meistarastevnum umframt stevnum hjá feløgum. Hetta í samráð við FINA, har hitt við testum so fyribils verður bara viðlíkhaldið og mennt í tí smáa.

Onkur smávegis ískoyti eru tó gjørd til upprunaligu verkætlanina, so sum at vit um jóltíðir keyptu eina Chronojump hoppmáttu, umframt nú tvey sett av Trainesense Smartpaddles, at læra at brúka. Vit verað skjótt beta-testarar av testútgerð frá Platysens, og er hetta alt sovorðið sum vit vóna at kunna brúka á landsliðslegum, og kanska hartil fara út til feløgini við.

## Útbúgving

Eisini her hevur verið friðarligt, tí at vit illa fingu gjørt so nógv við galdandi koronatilmælum. Men, nú verður sum nevnt eitt FINA-dómaraskeið í mai, umframt at fyrireikaði verða skeið í Merkjaskipanini, yvirdómaraútbúgving og kappsvimjivenjing. Eftir røttum eiga vit eitt FINA-hjálparvenjaraskeið allarhelst á heysti 2021, sum tó ikki enn er fingið heilt uppá pláss.

## Tøkni

Svimjisambandið mennir stútt um sínar tøkniligu skipanir, so at vit nú til dømis hava skipanir til talgilt at kunna fráboða met og kravtíðir, fráboðan um flyting millum feløg, umframt luttøku uttanlanda og nálatíðir. Nú á hesum aðalfundi er eitt uppskot lagt fram um keyp av Tempus Open frá IC Control, so at vit fáa okkara egnu tilmeldingar- og úrslitaskipan á netinum.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðnum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum, at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Nú í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, sum eisini vit ítróttarsambond og -feløg mugu fyrihalda okkum til. Tað kom kanska eitt sindur knappliga á

breddan, men royna vit okkara frægasta til at fáa eisini hetta upp á pláss, við til dømis innslag við advokati um hesa lóg á svimjiráðstevnuni á Viðareiði í november.

## Breidd

Aftur her hevur korona spilt okkum spælið, so at til dømis ætlaði Svimjifagnaðardagurin í fjør summar gleið út í sandin, og vit fyri so vítt heldur ikki fingu hildið okkara føðingardag. Vónandi verður frægari nú í 2021, og hava vit í øllum førum éitt átak í umbúna, sum vónandi kann fáa so nógvar føroyingar sum gjørligt at fara í svimjihylin.

## Svimjiførleiki

Í 2018 skipaðu vit fyri tveimum kanningum av svimjiførleikum í Føroyum, har Gallup hjálpti okkum við eini kanning av vaksnum, og vit síðani við loyvi frá UMMR spurdi vit allar næmingar í 5. flokki. Á sumri 2020 var endiliga tíð til at greina tilfari, sum síðani varð almannakunngjørt, og eru vit nú í 2021 í holtur við enn eitt umfar, eftir somu skipan.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi sum krevur tol; men komu vit nú á heysti 2020 tó til tað stóru løtu, at byrjað varð uppá langhylin í Tórshavn. Eftir ætlan stendur hann klárur longu í 2023, og eru runavíkingar vónandi eisini komnir langt við sínum tá.

## Flyting úr ÍSF-húsinum

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, var nú tíð til at ÍSF mátti flyta av økinum. Hetta kravdi ikki so lítið av okkum og restini av teimum sum húsaðust har, tá ið flytast skuldi á heysti 2020, og er loysnin nú eisini í so fyribils. Tíbetur kundi Runavíkar kommuna hjálpa okkum, so at vit hava góðar umstøður og alt væl herbergað, her hjá kommununi í Saltangará.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantsflog, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit nógvar aðrar trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at fáa góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum sum vit nú einaferð hoyra til.

# Niðurløga

A ja, hetta var so mín sjeynda formansfrágreiðing, sum kom at lýsa eitt sera løgið ár.

Hóast at tiltøkini vóru færri og uttanlandatilboðini eingi, so hevur arbeiðsbyrðan verið rættiliga stór hjá okkum og okkara feløgum, til at fáa avgreitt sum mest av tí sum bar til.

Vit royndu at leggja ætlanir um til dømis eina stóra venjingarlegu í Íslandi í heystferiuni 2020, sum tíbetur varð slept áðrenn allir svimjihyljarnir í Reykjavíkar-økinum tá knappliga vórðu stongdir.

Vit hava ráðlagt um landsdystir og luttøku á Reykjavík International, sum so í báðum førum tíverri heldur ikki bara til, samstundis sum vit allatíð hyggja til Danmarkar har støðan tíverri tykist enn verri.

Tá vit hyggja til hinar ítróttirnar, so tykiskt tað sum um at svimjingin er serliga hart rakt, tí tað hevur ikki verulig nakað veruligt at fara til, og so slettis einki á altjóða støði. Í øllum førum ikki fyri okkum.

Men, vit vóru faktiskt heilt væl stillaði, her í Føroyum, og hava eisini verið heppin at kunna hava tað mesta hjá okkum, sambært tilmælunum og uttan nakrar trupulleikar yvirhøvur við smittu.

Serliga feløgini eiga stórt rós og stóra tøkk uppiborið, fyri at hava hjálpt okkum við at fáa hetta at rigga, so mikið væl sum tað nú hóast alt gjørdi.

Nú í 2021 sær tað so líðandi frægari út, at vit kunnu byrja at fyrireika tað virksemi sum vit hava bíðað við, so sum landsliðslegur og skeið.

Vit hava mist burturav okkara skjótastu svimjarum, men hava týðiligvís eina rúgvu av ungum á veg, sum betra seg fyri hvørja stevnu sum er.

Takk tit øll fyri innsat og tol hetta farna árið,

við svimjikvøðu,
Saltangará 27. mars 2021
vegna starvsnevnd SSF
Rókur í Jákupsstovu